# Forfylgingin av sjúkrahúsevangelistinum Taddese

**Taddese var eingin vanligur evangelistur. Hann sat ósekur í fongsli, tá ið hann var umvendur og bleiv kristin. Hann skikkaði sær so væl í fongslinum, at hann slapp leysur áðrenn tíðina. Tá ið níggja sjúkrahúsið í Yirgalem var klárt í 1967, var hann biðin um at at vera evangelistur fyri sjúklingarnar, og hetta gjørdi hann til lítar. Her var nóg mikið at gera, tí tað vóru 4.500 árligar innleggingar**

Upprunaliga var tað missiónsfelagið, sum hevði ábyrgdina av rakstrinum av sjúkrahúsinum. Men í 1977, eftir kollveltingina, var tað avgørt, at staturin skuldi standa fyri sjúkrahúsinum og lønargjaldingum. Starvsfólkið fekk harvið rættindi sum alment sett.

Men hetta gav trupulleikar fyri Taddese. Kommunistarnir kundu jú ikki seta ein evangelist í starv! Men hetta varð greitt soleiðis, at Taddese var skrivaður sum sosialarbeiðari, men arbeiðið var tað sama.

Men hetta frættist sjálvsagt, eisini til lokalu floksskrivstovuna, at tað almenna hevði sett ein mann, sum eftir teirra tykki arbeiddi ímóti myndugleikunum.

Tað vóru gjørdar ætlanir at steðga honum. Men eingin tordi beinleiðis at gera nakað. Sjúkrahúsið var landskent og her komu fólk alla staðni frá. Tí kundu myndugleikarnir ikki rættuliga gera nakað, sum kundu koma at skapa teimum trupulleikar við og á sjúkrahúsinum.

## Misti sítt samleikaprógv

Men teir kundu gera lívið súrt fyri evangelistin, og her vóru nógvir møguleikar.

Í einum og hvørjum kommunistastati verður fyrr ella seinni vørutrot. Tað var heldur ikki leingi eftir kollveltingina í 1974, at sukur og mjøl varð skamtað. Víst kundi henda vøran keypast frítt í privatum handlum, men her var tað dupult so dýrt sum í handlunum hjá statinum. Fyri at kunna keypa í statshandlunum var neyðugt við samleikaprógvi. Tað skuldi jú vera eftirlit við øllum. Samleikaprógvini skuldu eisini endurnýggjast hvørt ár.

Tá ið Taddese eina ferð kom at endurnýggja sítt samleikaprógv, tóku teir kortið inn og bóðu hann koma aftur dagin eftir. Dagin eftir var eingin, sum fann kortið. Heldur ikki annan dagin eftir. So Taddese mátti klára seg uttan kort. Og nú kundi hann ikki keypa bíligt sukur og annað, tí hann kundi ikki prógva, hvør hann var.

Men hetta var ikki nóg mikið at ræða Taddese.


*Landslagið í Etiopia er stórsligið*


*Farið verður við neytum eins og í Føroyum í gomlum døgum*

## Bygdu landbrunn á hansara grundøki

Nú fóru teir at happa børnini hjá honum orsakað av pápanum. Ein súkla hvarv í grannalagnum, og ein sonur Taddese varð innkallaður á floksskrivstovuna og lagdur undir at vera tjóvur. Tey flestu skiltu, at her var talan um falskar ákærur.

Taddese helt fram at arbeiða. Børnini vóru errin at hava ein pápa, sum ikki lat seg ræða. Sjálvt floksleiðarar, sum komu á sjúkrahúsið, vitnaði hann fyri um sína trúgv. Teir tordu ikki at koyra hann út av sjúkrahúsinum. Kanska blivu teir so sjálvir útkoyrdir!

Taddese hevði keypt eini hús nærindis sjúkrahúsinum. Ein dagin koma ungfólk inn á grundina at høgga trøini hjá honum. Jú, viðurin skuldi brúkast til floksskrivstovuna!

Ein dagin frættir Taddese, at tað var samtykt á floksskrivstovuni at fongsla hann. Hann sleppur sær burtur sum skjótast, og tekur buss til Addis Abeba.

Eftir eina viku kemur hann aftur, og tá eru hesar ætlanir longu sleptar.

Men so mátti okkurt annað gerast fyri at gera honum lívið trupult. Ein dagin koma ungfólk og grava á hansara grund. Hvat hetta var? Jú, teir skuldu gera ein landbrunn til floksskrivstovuna, sum var nærindis. Nú helt hann tað vera ovboðið, men hvat kundi hann gera?

Hann fór at tosa við norska læknan á sjúkrahúsinum Sigmund Lende, sum var umrøddur í seinasta parti. Læknin visti, at hetta høvdu teir ikki rætt til. Men hvat kundi hann eisini gera?

## Fekk hjálp frá floksleiðsluni

Í lokalhøvuðsstaðnum Awasa var ein ungur lovandi maður á floksskrivstovuni. Hann kallaðist Belew, var væl úbúgvin og eisini dámligur. Tað kundu summir av teimum eisini vera. Hann hevði eisini verið innlagdur á sjúkrahúsinum, so læknin helt, at hann kundi loyva sær spyrja hann til ráðs.

Hann fór so at vitja Belew á skrivstovuni, og tað var so heppið, at Belew var at hitta. Læknin greiddi so honum frá øllum, ið var hent Taddese. Sigmund segði erliga, at hann metti hesa framferð at gera seg inn á Tadesse vera eina roynd at fáa hann út av sjúkrahúsinum, tí hann var evangelistur.

Belew metti, at hetta var ein ólóglig mannagongd. Teir høvdu ongan rætt at gera manninum ónáðir á hendan hátt. Hann biður so læknan fara aftur á sjúkrahúsið, so skuldi hann nokk orðna hetta.

Tríggjar dagar seinni frættist á sjúkrahúsinum, at bilurin hjá Belew var farin framvið á veg til Yirgalem. Eina løtu seinni frættist, at Belew var á floksskrivstovuni og hevði sent boð eftir lokala floksformanninum, sum arbeiddi á sjúkrahúsinum. Ein tíma seinni frættist, at hann var handtikin! Tað var júst hesin, sum hevði staðið aftanfyri happingina av Tadesse. Nú varð hann fastsettur fyri maktmisnýtslu. Hann sat í tríggjar dagar. Hetta var vist nóg mikið til at fáa hann at ásanna sítt mistak. Fjórða dagin var hann aftur til arbeiðis og lætst sum einki.

Nakað samstundis hevði Tadesse havt familjuráð heima hjá sær sjálvum. Øll vistu, hvussu vágafult hann livdi, hóast sloppið var hesa ferð. Men her var øll familjan samd um, at hann skuldi ikki bakka fyri yvirvøldini, hvat tað enn kom at kosta honum. Hetta var dirvið so tað munaði!

Tað var heldur ikki so leingi, at hann fekk frið. Seinni varð hann handtikin og hevði verið píndur. Bein hansara vórðu skadd. Hann slapp leysur aftur, men hann kom ikki fyri seg aftur. Hann fór frá við eftirløn og flutti til sína heimbygd nærindis Addis Abeba. Har hitti eg hann eisini eina ferð, eg kom hagar. Har doyði hann nøkur ár seinni.

Eg minnist Taddese sum ein trúgvan Harrans tænara. Hvønn morgun gekk hann runt á stovunum og las Guds orð fyri sjúklingunum. Hann hevði eina dámliga medferð, og varð virdur bæði av høgum og lágum.

"Øll børnini hjá okkum eru trúgvandi," segði Taddese, og gleðin lýsir av andliti hansara. "Vit ganga í Mekane Yesus kirkjuni her í Mekanissa í Addis Abeba," sigur hann. Tað tekur umleið ein tíma at ganga. Tey ungu ganga so skjótt segði hann. Hjá mær er tað eitt sindur tyngri, men eg vil so fegin koma og hoyra orðið vera boðað og at vera saman við Guds børnum. Gleði og friður vóru eyðkenni, sum eyðkendu Taddese.

**Næstu ferð:**
Í komandi parti verður millum annað greitt frá Lemma. Fyri gerast verdigur at gerast limur í kommunistaflokkinum gjørdist hann ein svíkjari. Men hetta gjørdist bert ein stokkut gleði

Sosialurin